ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

5. november 2021
Mál: 21/21985
Viðgjørt:

Nr. 52-068/2021

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-068/2021 eftir tingskipanini § 52a til Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismann við almannamálum, frá Una Rasmussen løgtingsmanni um Bústaðir

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Kann landsstýrismaðurin geva eina útgreining av, hvat leiguinntøkurnar hjá Bústøðum seinastu 5 roknskaparárini (2016-2020) eru nýttar til? Her verður hugsað um fyrisiting, viðlíkahald, niðurrindan av skuld v.m.

Svar:

Almannamálaráðið hevur í sambandi við viðgerðina av fyrispurninginum, vent sær til Bústaðir. Bústaðir hava upplýst fyri Almannamálaráðnum, at stovnurin hevur eina bruttoinntøku, sum er samansett av m.a. kapitalinntøkum og inntøku av leigumálum, og at tað tí ikki ber til at siga, hvat *leiguinntøkurnar* hjá Bústøðum eru brúktar til.

Niðanfyri er eitt yvirlit, sum Almannamálaráðið hevur fingið frá Bústøðum, sum vísir úrvaldar postar og samanteljingar úr ársroknskapunum hjá stovninum fyri roknskaparárini 2016-2020.

	2020	2019	2018	2017	2016
Inntøkur					
Inntøka av útlánum, virðisbrøvum v.m.	2.026.944	2.313.306	5.391.282	6.756.754	8.643.559
Inntøka av bíðilista, skráseting v.m.	498.650	422.389	488.600	308.940	294.848
Inntøkur í alt	*2.525.594*	*2.735.695*	*5.879.882*	*7.065.694*	*8.938.407*
Rakstur av leigumálum					
Inntøkur av leigumálum	21.261.318	17.124.410	13.173.514	8.563.367	6.165.978
Útreiðslur av leigumálum	-2.941.760	-2.676.840	-1.637.994	-1.479.658	-710.153
Rakstur av leigmálum	*18.319.558*	*14.447.570*	*11.535.520*	*7.083.709*	*5.455.825*
Rakstrarútreiðslur					
Sølukostnaður	-143.403	-177.859	-119.857	-211.626	-147.362
Høliskostnaður	-543.069	-340.442	-378.883	-473.621	-712.969
Fyrisitingarkostnaður	-2.998.000	-3.502.991	-3.774.084	-3.531.656	-3.752.520
Rakstrarútreiðslur	*-3.684.472*	*-4.021.292*	*-4.272.824*	*-4.216.903*	*-4.612.851*
BRUTTOÚRSLIT	**17.160.680**	**13.161.973**	**13.142.578**	**9.932.500**	**9.781.381**
Starvsfólkakostnaður	-8.613.930	-10.166.804	-9.651.897	-8.713.732	-7.850.121
Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn	-7.234.622	-5.018.670	-4.240.683	-2.935.390	-2.824.420
Avsett móti tapi av útlánum og inngj. áður avskrivað v.m.	1.116.829	255.987	285.724	312.723	1.114.995
RAKSTRARÚRSLIT	**2.428.957**	**-1.767.514**	**-464.278**	**-1.403.899**	**221.835**
Aðrar fíggjarliga inntøkur	-	-	23.301	-	1.317
Arðir fíggjarligir kostnaðir	-2.100.402	-1.629.104	-2.484.879	-120.162	11.516
ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT	**328.555**	**-3.396.618**	**-2.925.856**	**-1.524.061**	**234.668**
Skattur av ársúrsliti		679.828	432.781		
ÁRSÚRSLIT	**328.555**	**-2.716.790**	**-2.493.075**	**-1.524.061**	**234.668**

Ársroknskapirnir eru at finna í heilum líki í ársfrágreiðingunum, sum liggja á heimasíðuni hjá Bústøðum www.bustadir.fo.

Tórshavn, 5. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður